# Vilja sleppa at samráðast

**Dagrøktarmammur kring landið er farnar at ótolnast eftir nýggjum sáttmála. Tað sama ger Føroya Arbeiðarafela, sum roynir at fáa samráðingar í lag við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**



*Børnini vita ikki enn av, at dagrøktarmammur teirra ongan sáttmála hava. Føroya Arbeiðarafelag roynir at fáa samband við Kommunala Arbeiðsgevaraelagið fyri at fáa gongd á sáttmálasamráðingarnar, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag*
*Tilvildarlig savnsmynd*

LØNARSAMRÁÐINGAR
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Lønarsáttmálin hjá dagrøktarmammunum gekk út tann 1. mei og er ikki enn endurnýggjaður. Grundin er, at bíðað hevur verið eftir samráðingum millum Starvsmannafelagið og Komunala Arbeiðsgevarafelagið, sigur Ingeborg Vinther, formaður Føroya Arbeiðaraelags, sum umboðar dagrøktarmammurnar.

Dagrøktarmammur, Sosialurin hevur tosað við, eru farnar at ótolnast efitr einum nýggjum sáttmála. Tær hala seg hava bíðað í so leingi, at fáa hann endurnýggjaðan, siga tær. Tá spurt hevur verið eftir nýggja sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag, verður svarað, at bíða verður eftir, at Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hava gjørt sáttmála sínamillum.

– Nú er tann sáttmáln gjørdur og undirskrivaður, so nú máttu vit kunnað átt tørn, halda dagrøktarmammurnar. Men enn hava tær einki frætt um nakrar samráðingar kortini.

Tað er Føroya Arbeiðarafelag, sum varðar av dagrøktarmammunum og sostatt skal samráðast við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tað er rætt, at tey hava sagt dagrøktarmammunum, at tey bíða eftir samráðingunum mllum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Og nú samráðingar teirra eru lidnar, og sáttmáli undirskrivaður, væntaði hon eisini at sleppa í gongd við teirra sáttmálasamráðingar beinanveg.

– Men tað dregur út, sigur Ingeborg Vinther. Vit royndu beinanveg, tey vóru liðug, at koma í samband við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, men tað hevur enn ikki eydnast, hóast nú er næstan ein vika liðin, síðan hinar samráðingarnar vóru lidnar.

Sáttmálin millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um dagrøktarmamurnar gekk út fyrsta mei, og ein nýggjur sáttmáli, sum gjørdur verður, fer at fáa gildi við afturvirkandi kraft frá 1. mei 2003, sigur Ingeborg Vinther.

# Koyrandi til Gásadals á jólum

**Gásadalsfólk kunnu væntandi koma koyrandi til bygdar at halda jól, sigur landsverkfrøðingurin. Ein arbeiðsvegur verður nú gjørdur oman í sjálva bygdina**

GÁSADALSVEGURIN
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:**
Arbeit verður við fullari styrki upp á vegin oman í bygdina í Gásadali. Væntandi verður koyrandi til húsini á jólum, sigr Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

Gamla ætlanin um vegføring inn í dalin er slept, og í samráð við Bíggjar Kommunu verður vegurin nú lagdur ytri á oman móti lendingini og so niðan aftur í bygdina.

Oyvindur Brimnes sigur, at hann er heldur brattari, enn vanligu krøvini til slíkar vegir eru, men at undantaksloyvi er givið við tí í huga, at ferðslan verður heldur avmarkað á vegnum. Slík undantaksloyvi er rímiliga vanligt at geva, tá talan er um smáar vegir, sigur landsverkfrøðingurin.

Tað verður koritni ikki so, at vegurin verður opin fyri almennari ferðslu, soleiðsi at hvør sum helst kann fara sunnudagstúr til Gásasals við bili. Til tess er sálvur tunnilin ikki klárur, sigur Oyvindur Brimnes. Loftið í tunlinum er tryggjað, men portlarnir eru ikki gjørdir. Trygdarútgerðin, sum krevst til slíkan tunnil, er heldur ikki fingin til vega enn. Tunnilin er stongdur, men gásadalsfólk hava lykil, so tey kunnu ferðast undir egnari ábyrgd gjøgnum tunnilin.

Tað fer at lætta munandi um lívið í bygdini at kunna fáa alla ta vøru, teimum er tøvur á, tann vegin, sigur landsverkfrøðingurin.

Landsverkførðingurin fekk í heyst eina eykajáttan til Gásadalsvegin, men hon kom so mikið seint, at ivasamt verður, um hon øll verður brúkt í ár.

Til at gera tunilin og vegin endaliga lidnar resta knappar 10 milliónir krónur í, sigur landsverkfrøðingurin. Men tær eru ikki allar játtaðar á fíggjalógini fyri næsta ár, so ikki kann væntast, at almenningurin fær atgongd til Gásadals eftir vegnum rættiliga enn.



*Gásadalsfólk sleppa undir egnari ábyrgd helst at koyra til bygdar á jólum*



Føroya Skipaskráseting:

# Hvilvtenni framvegis skrásettur í Føroyum

**Nevndarformaðurin í P/F Hvilvtenni, Niels Winther Poulsen, vil hvørki vátta ella avsanna, um rækjutrolarin, Hvilvtenni, er seldur. - Eg úttali meg ikki um míni viðskiftafólk, sigur hann. Reiðarin, Kjartan Joensen, er framvegis líka »tættur«, sum fyrr í vikuni – og vil einki siga**



*Nevndarformaðurin í P/F Hvilvtenni, Niels Winther Poulsen, vil heldur ikki vátta – ella avsanna – um rækjutrolarin, Hvilvtenni, er seldur. Á Føroya Skipaskráseting siga tey, at skipið er enn í føroyska fiskiskipaflotanum*

HVILVTENNI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn hevur ikki eydnast Sosialinum at fáa endaliga váttað, um Hvilvtenni er seldur av landinum ella ikki.

Herfyri bórust tíðindi um, at rækjutrolarin varð seldur til Íslands, men reiðarin, Kjartan Joensen, vildi hvørki vátta ella avsanna tíðindini.

Hann segði seg onga viðmerking hava til málið og legði aftrat, at "…nú er nokk tosað".

### Tøgn um málið

Fyrr í vikuni gjørdi Sosialurin eisini eina roynd at tosa við Jørgen Bast í Danmark, ið situr á skrivstovuni, sum umboðar donsku pengarnar í reiðarínum. Jørgen vísti eisini til Kjartan Joensen, men legði tó aftrat, at Niels Winther Poulsen er nevndarformaður í felagnum, P/F Hvilvtenni.

Fríggjamorgunin fingu vit fatur á Niels Winther, men hann vildi heldur ikki siga, um skipið er selt – ella framvegis er í føroyska fiskiskipaflotanum.

- Eg úttali meg ikki um míni viðskiftafólk, sigur hann.

Tá ið vit spurdu, um hann ikki er nevndarformaður í felagnum og tískil kundi úttala seg, segði hann:

- Bæði og. Eg eri nevndarformaður, og samstundis er felagið ein av okkara »kundum«, sum eg ikki úttali meg um.

Niels Winther mælti tí til, at vit tosaðu við Kjartan Joensen, sum er reiðari.

Vit vendu okkum tískil aftur til Kjartan Joensen fríggjamorgunin, men hann var enn líka »tættur« sum fyrr í vikuni, tá ið vit fregnaðust – og vildi enn einaferð einki siga um, hvørt skipið er selt ella ikki.

### Hvilvtenni er enn í flotanum

Á Føroya Skipaskráseting siga tey, at Hvilvtenni framvegis er í føroyska fiskiskipaflotanum.

- Vit hava onga fráboðan fingið um, at skipið skal strikast úr føroysku skipaskrásetingini, og tí er skipið framvegis heimahoyrandi í Føroyum, siga tey.

Fyribils ber ikki til at koma málinum nærri, men líkt kundi verið til, at reiðaríið bíðar eftir einum seinasta møguleika, har landsstýrið á ein ella annan hátt kemur rækjuskipaflotanum til hjálpar.

Men hetta eru bara gitingar…



*Kjartan Joensen, reiðari, vil framvegis ikki siga, um Hvilvtenni er seldur. - Eg haldi, at tað er nógmikið tosað - og eg havi onga viðmerking til málið, sigur hann*

# Trolarar fiska tosk á Rygginum

**Vesturvarði var í Saltangará hósdagin við 110.000-120.000 pundum, harav meginparturin av veiðini var toskur, sum teir høvdu fingið á Rygginum millum Føroyar og Íslands. - Hetta er ikki føroyskur toskur, sum skipini fáa, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari á Fiskavirking í Saltangará**



*- Tað ger mun, at upsin, sum skipini hava fingið í seinastuni, hevur verið størri enn annars, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari á Fiskavirking í Saltangará*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nóvur fiskur er komin uppá land í Saltangará hesar seinastu dagarnar.

Fiskavirking hevur landað tilsamans fýra trolarar, sum hava fingið væl av upsa og toski.

Á virkinum hava tey nóg mikið av fiski niðurfyri til ein part av mánadegnum eisini.

### Upsi og toskur

Tíðliga í vikuni landaði Safir 120.000-125.000 pund, harav eini 90.000 pund var upsi.

Síðan vóru Akranes og Dragasund, fyrrverandi Topas og Sardis, inni við umleið 200.000 pundum, harav upsin var 140.000 pund.

At enda var Vesturvarði inni hósdagin við 110.000-120.000 pundum av fiski. Av hesum var 16.000-20.000 pund upsi, meðan restin var toskur, hýsa og onnur fiskasløg.

### Á Rygginum

Jason Johannesen, virkisleiðari á Fiskavirking í Saltangará, sigur, at fleiri trolarar hava roynt á Rygginum millum Føroyar og Ísland í seinastuni. Har hevur væl av toski at fingið, men hetta er ikki sami toskur, sum vanliga fæst undir Føroyum.

- Nei, hetta er íslandstoskur – og ikki føroyskur, sigur Jason.

Hann vísir á, at hetta annars er hampiliga góður fiskur.

### Upsin størri

Virkisleiðarin sigur, at upsin, sum skipini eru komin við hesa sienastu vikuna, hevur verið væl betri, enn upsin annars hevur verið í heyst.

Jason heldur, at skipini hava roynt at fingið fatur á frægari upsa, og tað hevur so eydnast teimum í seinastuni.

Á Fiskavirking í Saltangará arbeiða tey bara upsa, og tí fer toskurin, sum landaður verður í Saltangará, til onnur virkir.

Jason Johannesen sigur, at tað ger góðan mun, at upsin nú hevur verið frægari, tí hann hevur annars verið so ógvuliga smáur í langa tíð.

- Vit hava havt nóg mikið at gera í alt heyst, sigur virkisleiðarin at enda.